Jórunn Dánialsdóttir:

# Leitar eftir myndum til ólavsøkuframsýning

FRAMSÝNING

Í sambandi við at í fjør vóru 90 ár liðin síðan “Færøernes Mellem- og Realskole” flutti í nýggjan bygning í Tórsgøtu í 1916, skipar Jórunn Dánialsdóttir í Havn fyri eini framsýnining í hesum bygningi á ólavsøku 2007.

Í fjør skipaði Jórunn saman við øðrum fyri eini líknandi framsýning í Kommunuskúlanum (við síðuna av realskúlanum) í sambandi við at tað vóru liðin 50 ár síðan tann skúlin varð tikin í nýtslu.

“Færøernes Mellem- og Realskole” var stovnaður í 1861 og virkaði til hann varð samanlagdur við Kommunuskúlan í 1962 sum 3 ára realdeild uttan millumskúla. Tá kom skipanin við 8. og 9. flokkunum eisini í gildi. Seinastu realskúlanæmingarnir eftir gomlu skipanini fingu prógv í 1965.

Myndirnar sum Jórunn leitar eftir eru frá tíðarskeiðinum frá 1916 til 1966.

Talan er um myndir av næmingum og lærarum, bæði myndum sum eru tiknar hjá fotografi og privatar myndir.

Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024.

Myndirnar kunnu eisini latast inn navnmerktar í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23.



*Í sambandi við eina framsýning í Realskúlanum á ólavsøku 2007, leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum frá “Færøernes Mellem- og Realskole” í tíðarskeiðinum 1916 til 1966*



*Myndin er helst tikin í 1943 í Tórsgøtu uttan fyri realskúlan. Hans Andrias Djurhuus, lærari, saman við fýra av næmingum sínum, ovast Anna Sofía Nolsøe (f. Hentze), Gunnvør Zachariassen (Dyssa), Anna Weihe og Anna Mohr (f. Jacobsen). Leggið til merkis bygningin til høgru myndini, har sum Kommunuskúlin er í dag*

*Myndaeigari: Ingibjørg Djurhuus*



***4b í “Færøernes Mellem- og Realskole” í 1961. Aftara rað f.v.:** Áki Mouritsen, Elin Mortensen, Knút Bjørk, Árni S. Olsen, Símun av Skarði, Bjarki Mortensen, Búgvi Joensen, Helga Hentze, Bjarni Rubek Nielsen og Jóan Petur Midjord. **Miðraðið f.v.:** Anna Sofía Rasmussen, Elinbjørg Højgaard, Jógvan við Ánna, flokslærari, Turið Joensen og Marsanna Holm. **Fremsta rað f.v.:** Niels Nattestad, Gunvør Mortensen, Svanhild Seyer Hansen, Brynhild Sørensen, Betta Gilstón og Lea Simonsen*